gult cyan magenta svart

Forma›ur Tjó›veldisflóksins, Høgni Hoydal:

Økismenning er landsmenning

- *Ein t‡›andi partur av politisku ætlanum okkara, bæ›i í sambandi vi› lóggávu og umsiting, er økismenning – at geva øllum økjunum í landinum javngó›ar vakstrar- og menningarmøguleikar.*
- *Men ta› er tó framvegis frá fólkinum á sta›num, at hugskotini og menningin skal koma, sigur Høgni Hoydal.*
- *Annars ver›ur talan um studningsbúskapin umaftur.*

TUMMAS Í DALI

Til vali› í 98 leg›i Tjó›veldisflokkurin serstakan dent á fylkingaror›ini: Økismenning er landsmenning! – og gjørdust hugmyndirnar aftan fyri setningin eisini t‡›andi partur av samgonguskjalinum millum Fólkaflokkin, Sjálvst‡risflokkin og Tjó›veldisflokkin.

Men forma›ur Tjó›veldisfloksins vi›urkennir, at fólk higartil hava sæ› alt ov líti› til hesi føgru or› í verki.

– Eg skilji væl, at su›uroyingar flenna upp á há›, tá i› ein skræ›ugákur sum eg tosar um økismenning. Teir peika m.a. á avloysaraskipi› hjá Smyrli, á oljuvinnuna, á vegakervi› og mangt anna›. Hetta kemst partvís av tí, at ein stórur íløgutørvur liggur og bí›ar eftir kreppuna.

– Kortini skal ongin ivast í, at økismenning hevur og fer at hava alstóran t‡dning í føroyskum politikki komandi árini, sigur Høgni Hoydal.

– Økismenning er rætt og slætt ney›ugt, tá vit skulu skapa eitt sjálvbjargi› og livandi føroyskt samfelag vi› fullari ábyrgd.

Endamál Tjó›veldisfloksins er jú at vinna fullveldi› vi› vælfer›arsamfelagnum var›veittum.

Søguliga gongdin

Ta›, sum hevur bori› føroyska samfelagi› – vinnulívi›, mentanina og sosiala samanhaldi› – hevur veri› drívmegin í teim einstøku bygdunum. Hetta var eisini orsøkin til, at tær upprunaligu kommunurnar gjørdust 52 í tali, vísir Høgni Hoydal á.

– Fólki› og vinnan í bygdunum vildu hava ávirkan á sína egnu framtí›, á sínar egnu møguleikar fyri menning.

– Su›uroyggin var ídna›armi›depil, tá fari› var› inn í 20. øld.

– Klaksvík, Eysturoy, Vágar og Vestmanna yvirhálu›u seinni; men Havnin hevur altí› veri› í eini serstø›u.

– Ikki fyrr enn eftir seinna heimsbardaga gerast Føroyar ein verulig eind, har tann politiski, umsitingarligi og handilsligi mi›depilin í Tórshavn fær eina sanna oddastø›u í nútímans samfelagnum.

– Tá ver›ur landi› rættiliga samanbundi› vi› samfer›slukervi, samskiftiskervi, umsiting, almanna-, heilsu- og skúlaskipan.

– Í 70'unum og 80'unum tekur hendan gongdin dik á seg, har ta› almenna – land og kommunur – gerast teir mest t‡›andi leikararnir í at fáa gongd á menningina.

– Men útoyggjarnar, sum høvdu veri› gó›ir hjallar í bóndasamfelagnum, hava veri› fyri afturgongd í ídna›arsamfelagnum.

– Og seinastu árini hava ikki bara bygdir, men størri øki veri› rakt av stø›ugari afturgongd á naka› sama hátt sum útoyggjarnar – og mi›sta›arøki› dregur alt meiri til sín.

– Serliga kreppan í 90-unum gjørdi stø›una uppaftur truplari hjá fleiri økjum, serliga Su›uroynni og Sandoynni.

– Í Sandoynni hava vit kunna› frætt okkum um stóra framgongd seinastu árini, sum m.a. sokalla›a Sandoyarætlanin hevur veri› vi› til at lagt grundarlag fyri. Í dag s‡nist Sandoyggin at hava gó›ar vakstrarmøguleikar.

– Men mangasta›ni í Su›uroynni er tíverri lítil framgongd á hóma. Hetta er ein veruleiki, sum vit í Tjó›veldisflokkinum ásanna og virka fyri at broyta.

Samband og samstarv

Tey alra flestu ivast neyvan í, at ta› var rætt at geva bygdunum lut í útbyggingini av samfer›slukervinum, tí vi› hesum hava vit skapt n‡ggjar møguleikar fyri tey ymsu økini. Í hesum sambandi vísir Høgni Hoydal á teir heilt n‡ggju møguleikarnar fyri samstarvi, sum ta› n‡ggja og bøtta sambandi› gevur í dag.

– Eg meti ta› vera ney›ugt bæ›i at flyta tey umsitingarligu mørkini, og at tey verandi umsitiningarlig økini n‡ta møguleikarnar, sum n‡ggja sambandi› gevur, og samstarva nærri á alt fleiri og n‡ggjum økjum – innan umsiting, vinnu, skúla og mentan.

– Tí er økismenning í dag treytin fyri bygdamenning. Hon er lykilin til, at mi›savningin ikki skal halda fram, sigur Høgni Hoydal.- Su›uroyggin má samstarva – eins og Sandoyggin, Vágarnar, Nor›streymoy, økini í Esturoynni og Nor›oyggjar.

Økismenning og fullveldi

– Fyritreytin fyri eini livandi føroyskari mentan og trivna›i hjá føroyingum í dag er eftir hugsan Tjó›veldisfloksins, at lív og vøkstur er í øllum plássum í landinum, sigur Høgni Hoydal.

– Uttan bygdirnar, uttan eina spjadda búseting, uttan tilkn‡ti hjá uppvaksandi ættarli›um til sín heimsta› og til alla ta vitan, sum liggur eftir forfedrarnar, og uttan at landi› ver›ur røkt í síni heild, gerast allar Føroyar eitt deytt samfelag, sum fyri ta› kundi ligi› á mánanum.

– Ta›, sum heimurin skríggjar eftir í dag, er samleiki, meining vi› lívinum, smærri samfeløg, i› virka, og fjølbroyttar mentanir. Ta› ver›ur hetta, sum kann skapa vælfer› og trivna› í framtí›ini – og eisini búskaparligan vøkstur.

– Tí hanga fullveldi og økismenning óloysiliga saman í politisku hugmynd Tjó›veldisfloksins, sigur Høgni Hoydal.

– Júst sum føroyingar eiga at vinna sær politiska og búskaparliga javnstø›u millum heimsins tjó›ir, somulei›is eigur politikkur og búskaparlig javnstø›a at vera millum føroyingar – uttan mun til hvar í landinum, teir búgva.

Nøkur ítøkilig tiltøk

Samgongan hevur gjørt uppskot um eina langtí›arætlan fyri næstu 10 árini, og í tí sambandinum hava tankarnir um økismenning t‡›iliga gjørt seg galdandi.

Men longu nú metir Høgni Hoydal, at samgongan kann vísa á nøkur ítøkilig úrslit.

M.a. hevur avskrivingin av skuldini hjá teim fíggjarliga veiku kommunum tiki› stø›i í politikkinum fyri økismenning.

– Annars er ta› mest á samfer›sluøkinum, at stig eru tikin. Her er talan um Vágatunnilin, n‡ggja Sandoyarferju, n‡ggja ferju til siglingina millum Su›uroyna og Tórshavn, umframt íløgur til tunnil og havnager› í Su›uroynni. Eisini kann nevnast íløgur til n‡ggjan studentaskúla í Su›uroynni og n‡ggjan skúla í Sandoynni.

Høgni Hoydal vísir á, at hesi stig hava veri› brá›ney›ugt, men at tey als ikki eru nóg miki›, skal økismenningarpolitikkurin eydnast.

Fimm fyritreytir

Hóast ta› ver›ur mett alney›ugt, at vit fyriskipa ta› so, at almenn umsiting kann fara fram úti á økjunum – og ikki einans í Havn – so ver›ur ta› ikki gjørt treytaleyst.

Høgni Hoydal nevnir fimm fyritreytir:

– Í fyrsta lagi: at vit gó›taka, at Tórshavn er høvu›sta›ur Føroya og at har liggur almenna mi›fyrisitingin.

– Mi›fyrisitingin er tann parturin av umsitingini hjá tí almenna, sum ger lógir og reglur og ger eftirlit vi›, at hesar ver›a hildnar.

Í ø›rum lagi: at vit fáa skipa› størri umsitingarligar eindir kring landi›, sum kunnu taka á seg umsitingarligar uppgávur, sum í dag liggja í Havn.

Antin kommunur velja at leggja saman ella stovna felags umsiting er líkamiki›. Men samstarva mugu tær, tí tásta›ni kunnu størri øki sum barnaansing, eldrarøkt, almannamál, fólkaskúlin, tann grundleggjandi heilsutænastan og mentamál umsitast í økjunum – eins og fólk vi› mi›- og hægri útbúgvingum fáa vinnumøguleikar kring alt landi›.

Landsst‡ri› hevur ætlanir um at leggja fleiri mál út til kommunurnar at umsita, sum jú longu er gjørt vi› barnaansingina.

Í tri›ja lagi: vit mugu skapa skúladeplar, sum eru partar av einum savna›um skúlaverki í landinum. Hetta gevur møguleikar fyri samstarvi vi› vinnulívi› á sta›num og menningarmøguleikar sum heild. Á tann hátt kunnu skúlar og hægri útbúgving ver›a løgd kring landi›.

Í fjór›a lagi: at vit leggja almennar stovnar kring landi›. Hetta er lættast at gera, tá i› tørvur ver›ur á n‡ggjum uppgávum.

Í fimta lagi: at vit leggja ítøkiligan botn fyri eini vinnulívsmenning.

Í samgonguskjalinum ver›ur sagt, at vi›tøkurnar fyri Framtaksgrunnin skulu broytast solei›is, at hann stu›lar einum økismenningarpolitikki.

Hetta merkir tó ikki, at hann skal veita studning til verkætlanir, sum ikki bera seg. Men hann skal vísa fyrilit til vinnumenningina kring landi› í sínum virki.

– Men tíverri er onki gjørt á hesum øki.

Økismenning – naka› sjálvsagt

– Ta› er ein spurningur, um politiski bo›skapurin vi›víkjandi økismenning sæst nóg greitt í dagligu fyrisitingini, sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur dent á, at økismenningarpolitikkurin í framtí›ini skal metast sum ein natúrligur partur av landspolitikkinum og fyrisitingini.

– Hóast nógv er tosa›, er ov líti› ítøkiligt komi› burturúr higartil. Men eg kann nú sta›festa, at naka› veruligt er vi› at henda.

– Nærum ongin landsst‡risfundur er fram, uttan at økismenningin stendur á skránni. Í flestu løgtingsmálum er eisini økismenningin t‡›andi partur av vi›ger›ini.

– Í hesum sambandi er vert at leggja dent á, at landsst‡ri› hevur sent rundskriv út til alla fyrisitingina um, at fyrisitingin í øllum lógaruppskotum skal vi›gera økismenningina.

– Tá lógir ver›a smí›a›ar skal grundgevast fyri, hvønn t‡dning tær fáa fyri ymsu økini í landinum, og tilmæli skal gerast um, hvar umsitingin skal liggja.

– Hetta fær uttan iva stóran t‡dning í framtí›ini, sigur Høgni Hoydal.

Ikki bí›a eftir politikarunum í Havn

Men halda fólk, at ta› ber til at sita hendur í favn og bí›a eftir, at landsst‡ri› fremur økismenningina av einslistum, so fara tey skeiv.

– Mi›fyrisitingin og landsst‡ri› seta ikki nakra økismenning í gongd, sigur Høgni Hoydal. – Ta› er bert virkishugurin og uppskotini frá fólki kring landi›, sum í veruleikanum kunnu skapa trivna› og vøkstur.

– Landsst‡ri› og landspolitikarar kunnu bert royna at tryggja javnbjó›is umstø›ur.

– Ofta tykist ta› tíverri sum at ta› er so sára lætt at skelda inn á teir fínu harrarnar í Havn, og er ta› grundgevingin fyri, at onki hendir. Ella at bí›i› ver›ur studning, sum um ta› er loysnin á øllum.

– Men hetta byggir onki land – ta› kenna vit alt til. Ta› elvir tvørturímóti til hefni og ómynduggering.

Møguleiki er at venda gongdini

Høgni Hoydal ivast ikki í, at nú er møguleiki at venda gongdini.

Hann vísir á, at hann í juni í ár setti nevnd, sum Hergeir Nielsen o.o. fingu samtykt undir fíggjarlógarvi›ger›ini í løgtinginum í desembur í fjør.

– Nevndin er sett vi› skilagó›um fólki úr øllum landinum til at vi›gera og koma vi› ítøkiligum tilmælum um økismenningarpolitikk.

– Nevndin skal eisini samstarva vi› útoyggjanevndina, sum vi›ger serligu stø›una hjá útoyggjunum og Gásadali.

– Hartil var ein granskingardepil settur á stovn í Klaksvík í 99, sum burturav skal arbei›a vi› spurningunum um økismenning.

Tá i› alt kemur til alt væntar Høgni Hoydal, at skilagó› úrslit fara at spyrjast burturúr øllum hesum: politikki landsst‡risins, lógarkarmunum, sum skaptir eru, og nevndararbei›inum.

Men hann ger greitt:

– Uttan hugskot, ætlanir og meiningar frá teimum, sum liva vi› og kenna vi›urskiftini, kann alt gerast meira tos og onki veruleiki.

- Landsst‡ri› hevur sent rundskriv út til fyrisitingina um, at fyrisitingin í øllum lógaruppskotum skal vi›gera økismenningina.
- Økismenningin er ein natúrligur partur av landspolitikkinum og fyrisitingini.
- Landsst‡ri› hevur ætlanir um at leggja fleiri mál út til kommunurnar at umsita.
- Landsst‡ri› og mi›fyrisitingin seta ikki nakra økismenning í gongd. Ta› er bert virkishugurin og uppskotini frá fólki kring landi›, sum kunnu skapa trivna› og vøkstur.